# NORÐTOFTIR

Fólkatal: 3 (2017). Hvannasunds kommuna. / *Population: 3 (2017). Municipality of Hvannasund.*










Her ert tú
*You are here*

Hjartastartari. Innan fyri høvuðsdyrnar á Bakkafrosti, á vegginum beint fram

*Defibrillator. Inside the main entrance of Bakkafrost, on the wall straight ahead*

Gongutúrur
*Hike*

Gongugøta
*Walking path*

Neyð og hjálp
*Emergency call*
**112**

## FO

Á Norðtoftum eru fleiri áhugaverd staðarnøvn, sum vitna um farnar tíðir. Bygdin var eitt skifti heimstaður hjá ríkasta manni í Norðoyggjum og hýsir í dag einum nýmótans alivirki.

### Søga

Orðið toftir sipar til leivdir av húsum, og bygdarnavnið ber boð um, at Norðtoftir hava verið avtoftaðar. Hildið verður, at bygdin doyði út eitt skifti, tá ið svartideyði herjaði um ár 1350, og at eitt nýtt ættarlið seinni búsettist á toftunum. Upprunaliga bygdarnavnið er Toftir. Norð varð sett frammanfyri av umsitingarligum áðum, tá ið postverkið varð sett á stovn. Í Norðoyggjum hava fólk tó ikki tikið við nýggja navninum, og Toftir verður enn brúkt í gerandismáli. Norðtoftir venda ímóti norði. Sunnan og vestan fyri bygdina reisa høg og brøtt fjøll seg upp ímóti himni, og steyrrættu borgirnar skugga fyri sólini ein part av árinum. Bygdin var fólkaríkast um ár 1900, tá um 30 fólk búðu á Norðtoftum, og 8 hús vóru í bygdini.

### Hvalvíks Jógvan

Frá 1718 til 1743 vóru Norðtoftir heimstaður hjá einum av ríkastu monnunum í Norðoyggjum, nevniliga Joen Olesen, ið varð kallaður Hvalvíks Jógvan. Hann var ættaður úr Hvalvík og giftist Margrete Danielsdatter, ið var prestadóttir av Viðareiði. Um Hvalvíks Jógvan verður sagt, at hann gróv ikki talentir sínar niður, tí hann lænti pening út ímóti panti í jørð og økti soleiðis um ognir sínar. Ein søgn úr Færøske folkesagn og æventyr eftir Jakob Jakobsen sigur, at Hvalvíks Jógvan doyði av eini illbøn, har gandur var uppií. Fíggindskapur hevði tikið seg upp ímillum Jákup úr Sundi, ið dugdi gand, og Sakaris, ið varð ættaður úr Hvalvík. Jákup úr Sundi sendi illbønina eftir Sakarisi, men hon fór ístaðin tvørtur um sundið og rakti Hvalvíks Jógvan, ið gjørdist sjúkur og doyði av henni.

### Bakkafrost

Alifyritøkan Bakkafrost hevur smoltstøð á Norðtoftum (1). Bakkafrost varð sett á stovn í 1968 og rekur seks smoltstøðir í Føroyum. Eftir at víðkað var um virksemið á smoltstøðini á Norðtoftum í 2014, varð samlaða framleiðsluorkan um 12 milliónir smolt um árið – harav 4,5 milliónir vórðu framleidd á Norðtoftum. Smoltstøðin varð bygd í 1984, og Bakkafrost yvirtók virksemið í 2006. Um 10 fólk starvast á smoltstøðini (2017).

### Skiparatúgva

Á Norðtoftum er ein túgva, ið kallast Skiparatúgva (2). Hon sigst hava fingið navn sítt eftir skiparanum á einum smuglaraskipi, sum lá á sundinum. Manningin setti hann av á Norðtoftum, og tað sigst, at hann sat leingi og skimaðist á hesi túgvu.

### Havið

Eitt hav (3) er at finna í túninum á Norðtoftum. Eitt hav er ein tungur steinur, sum fólk hava lyft fyri at vísa sína megi. Havið á Norðtoftum er klovnað, men einaferð hevur borið til at lyfta tað við at stinga hondina ígjøgnum tað – um styrkin var til tess. Høv eru at finna runt um í Føroyum, og bæði kvinnur og menn hava roynt at lyft tey. Eitt orðatak sigur, at tann neytakona, ið ikki orkaði at hevja havinum, varð søgd ikki at vera neytakonufør.

## EN

*In Norðtoftir you will find several interesting place names that bear witness to bygone ages. The village was for a time the home of the richest man in the Northern Islands, and today it is the home of a modern fish farming industry.*

### History

*The word „toftir" refers to the remains of houses, and the village name indicates that Norðtoftir has once been depopulated. It is speculated that the village died out for a time after the Black Death raged, around the year 1350, and that a new generation later settled here among the remains. The original name of the village is Toftir. „Norð" was added for administrative reasons when the Faroese postal service was established. In the Northern Islands, the new name did not stick, and the village is still called Toftir in everyday speech. To the south and the west of the village, tall and steep mountains rise towards the sky, and these vertical strongholds block out the sun for a part of the year. The village was most populous around the year 1900 when around 30 people lived in Norðtoftir, and there were eight houses in the village.*

### Hvalvíks-Jógvan

*From 1718 to 1743, Norðtoftir was the home of one of the wealthiest men in the Northern Islands: Joen Olesen, also known as „Hvalvíks-Jógvan". He came from Hvalvík and married Margrete Danielsdatter, daughter of a priest from Viðareiði. It was said about Hvalvík-Jógvan that he did not hide his talents, because he offered secured loans to locals, where the borrowers pledged their land as collateral for the loan. In this way, he was able to add to his landed property. A tale from the book, „Færøske folkesagn og æventyr" by Jakob Jakobsen, tells the story of how black magic caused the death of Hvalvíks-Jógvan. It was said that he died from a curse. There was rising hostility between Jákup úr Sundi, who was a sorcerer, and Sakaris, who came from Hvalvík. Jákup úr Sundi put a curse on Sakaris, but the evil went across the sound instead and reached Hvalvíks-Jógvan, who became ill and died from it.*

### Bakkafrost

*The fish farming company Bakkafrost has a smolt farm in Norðtoftir (1). Bakkafrost was established in 1968 and runs six smolt farms in the Faroe Islands. After an expansion of the facilities of the smolt farm in Norðtoftir, the combined production capacity was about 12 million smolt a year – of these 4.5 million were produced in Norðtoftir. The smolt farm was built in 1984, and Bakkafrost took over the business in 2006. Around ten people work at the smolt farm (2017).*

### Skiparatúgva

*In Norðtoftir there is a tussock known as Skiparatúgva (2). It is said to have gotten its name from the captain of a smuggler ship that lay in the sound. The crew put the captain ashore at Norðtoftir, and it is said that he sat for a long time on this tussock, scanning the horizon.*

### Havið

*In between the houses of Norðtoftir lies a heavy stone that people used to lift to show their strength (3). This kind of stone is called a „hav" in Faroese. The „hav" in Norðtoftir has split, but once upon a time it was possible to lift it by sticking your hand through it – if you were strong enough, that is. Other „hav" can be found elsewhere in the Faroe Islands, and both women and men have tried to lift them. There was a saying that claimed that if a milkmaid was unable to raise the „hav", she would be seen as an unqualified milkmaid. In the Faroe Islands, being a milkmaid was hard work because the milkmaids had to walk far into the outfield to milk the cows.*

### Ver ein hjálpirót

- Lat einki órudd liggja eftir tær – rudda heldur upp.
- Stuðla bygdunum – keyp staðbundnar vørur.

### Be a helping root

*Hjálpirót is the Faroese word for rose root (Rhodiola rosea), a flourishing plant traditionally used for medicine. Hjálpirót means „helping root", and you can be one by following these simple steps.*

- *Please do not litter – but feel free to pick up litter on your way.*
- *Support the local community – buy local goods.*

*

### Tá ið tú fert til fjals

- Best er at hava staðkendan ferðaleiðara við á túrum í fjøllunum – nærri kunning fæst á Norðoya Kunningarstovu.
- Boða onkrum frá, um tú fert til fjals uttan ferðaleiðara.
- Fylg rásum og varðum, og minst til at lata hagaportrini aftur eftir tær.
- Gev seyði, fugli og gróðuri frið.

### Hiking advice

- *We recommend that you bring a local guide with you on mountain hikes in the Northern Islands. Please contact Visit Norðoy for further information about guided hiking trips.*
- *If you do go on your own, please let your host know where you are going.*
- *Follow the paths and cairns, and close the outfield gates behind you.*
- *Avoid disturbing sheep, birds and plants.*

Nærri kunning um trygd á fjalltúrum fæst við at skanna hesa kotu.

*For more information about safe hiking in the Faroe Islands, please scan this code.*

Visit Norðoy

Tel. + 298 456939

Skanna hesa kotu, og kunna teg nærri um ferðamøguleikar í Norðoyggjum.

*Scan this code, and get more information about travelling in the Northern Islands.*

## VIT VIÐMÆLA

### Gongutúrur fram við fjøruni

Til ber at koma oman í fjøruna eftir gøtuni norðan fyri ánna (4) og frá parkeringsplássinum við Bakkafrost. Fjøran er trygg at vassa í, og góðir møguleikar eru at heinta tara, leita eftir krabbum og smákyktum ella bara njóta stórsligna útsýnið yvir sundið. Á keldu (5) er stað, har ein kelda rennur oman í havið undir jørð. Tá ið tað fjarar, ber til at síggja kelduna spríkja upp úr havinum. Staðið er hartil framúr gott reyðfiskamið.

## LOCAL'S CHOICE

### A walk along the foreshore

*The foreshore is accessible from this path to the north of the river (4) and the parking area at Bakkafrost. The foreshore is safe to wade in and offers great opportunities for collecting seaweed, looking for crabs and insects, or enjoying the magnificent view of the sound. Á Keldu (5) is the place where a spring streams into the sea underneath the ground. When the tide has gone out, you can see the spring squirting out of the sea. This location is also an excellent fishing ground for catching red cod.*